# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# HVÍ SO STÓRAN SKUND AT SELJA?

Freistin var stutt, tá Fíggjareftirlitið hótti við at leggja Eik Banka undir Finansiel Stabilitet fyri 1. oktober. Stutta skotbráið hevði kanska sína orsøk, men tað tykist kanska í so nógv avgjørt, tá umboð fyri Finansiel Stabilitet – ella bankan sjálvan, nú vilja hava landsstýrið at taka støðu beinanvegin, um landið skal vera við at keypa bankan ella ikki.

Í fyrstu syftu tykist hetta ikki skilagott. Bankin er bjargaður – kreppuloysnin er funnin. At leggja bankan undir Finansiel Stabilitet er ein kreppuloysn – ella rættari, tað er kreppuloysnin, sum føroysku peningastovnarnir hava goldið fyri. Tað er eisini ein skipan, sum er grundfest í tveimum politiskum skipanum – samtykt bæði á Føroya Løgtingi og á Fólkatingi.

Hví hevur hetta so stóran skund, kunnu vit spyrja. Landsstýrið hevur ringar royndir við bankaloysnum. Seinasta bankaloysnin setti viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í stóran váða og mundi endað við skilnaði millum Føroyar og Danmark. Fíggjarmálaráðharri ein stóran part av hesum tíðarskeiði var Jóannes Eidesgaard, so eingin burdi vitað so væl sum hann, hvør vandin er við eini ov bráari bankaloysn.

Tað fættist, at myndugleikarnir arbeiða við at brúka pengar úr Húsalánsgrunninum og møguliga úr Realinum til bankakeypið - ein góð milliard sigst vera í hesum grunnum, og saman við teimum 400 milliónunum, sum TF Holding er sinnað at koma við, so er hendan góða milliardin til taks, sum nevnd hevur verið sum søluprísur fyri føroyska partin av Eik Banka.

Tosað verður nógv um at varðveita bankan á føroyskum hondum. Men hví er tað nú so týdningarmikið? Í 87 ár átti Den Danske Bank meginpartin av Føroya Banka, og tað var so ikki orsøkin til, at bankin fór á húsagang.

Jóannes Eidesgaard óttast mest, um vit fáa eitt bankamonopol. Skal tað almenna keypa Eik - sannlíkt gjøgnum Fíggingargrunnin - so hevur tað almenna í roynd og veru




monopol. Og verður TF Holding ein týðandi partur, so hava vit tveir stórar bankar í Føroyum, sum tvinna saman banka- og trygging-arvirksemi. Tað er valla ein støða, sum Kappingarráðið kann liva við.

Men hví kann bankin ikki seljast í smáum? Hví kann TF Holding ikki keypa ein part nú? Kann bankin ikki børsnoterast og so seljast aftur í smáum? Landsstýrið hevur í øllum førum skyldu at greiða Føroya fólki frá hesum viðurskiftum.

Vit kunnu bara vóna, at bankin fær eitt gott og trygt grundarlag at virka á – um pengarnir, sum skulu tryggja hetta koma uttanífrá ger væl ikki støðuna verri...

**Landið hevur ringar royndir av bankaloysnum**

# Hvar eru kritisku public service brillurnar?

**Óluva Zachariasen** Tillukku við marathoninum. Ordiliga gott pressað:-)
8. November kl. 17.15 · Dáma · Viðmerk · Vís vinarlag

Trý løgtingsfólk hava seinastu dagarnar verið í New York við fullari løn frá Løgtinginum. Bjarni Djurholm er á aðalfundi hjá ST sum umboð fyri løgtingið, so tað er í ordan, at hann fær sína løn.

Bjørt Samuelsen og Sjúrður Skaale dáma væl at renna - so væl, at tey eru farin allan vegin til New York fyri at renna marathon. Alt gott um tað. Men tað skurrar, at tey bæði skulka frá løgtingsarbeiðinum fyri at fara ein slíkan túr. Tey kunnu illa siga, at tey umboð løgtingið í marathonrenning í New York, ella?

Portalurin og Rás2 bóru hesi tíðindi mikudagin - og Høgni Hoydal varð biðin um viðmerking, men hann bar seg undan.

Kringvarpið hevur ikki nevnt hetta. Men tíðindaleiðarin í útvarpinum, Óluva Zachariassen er vinur við Bjørt Samuelsen á Facebook, og har skrivar hon, at *»tað er ordiliga gott pressað«* av Bjørt.

Vit spyrja bara, hvar eru tær kritisku brillurnar hjá útvarpinum?

Tað kann ikki vera rætt, at tíðindaleiðarin skrivar slíka heilsan til ein politikara, sum hevur gjørt nakað kritiskt við at taka løn fyri frítíðartúr...

Hvar eru kritisku public service brillurinar hjá Kringvarpinum?

# DJ og VJ í Klubb 188

Í annaðkvøld, leygarkvøldið, verður bæði DJ og VJ show fyri ungum í Ungdómshúsinum í Hoyvíkar skúla, sum eitur Klubb 188.

Levi Mørk, leiðar í Ungdómshúsinum sigur, at opið verður frá klokkan 22 til 02. Hann leggur dent á, at tiltakið er í rúsfríum umhvørvi - og kostar 50 krónur. Tað verður




Pandaboy, sum verður DJ.

Tiltakið í Frítíðarskúlanum í Hoyvíkar skúla er til ung millum 13 og 18 ár.

Klubb 188 ætlar annars at hava okkurt at bjóða teimum ungu av og á, har tey sjálvi seta dám á tiltøkini. Levi Mørk vísir á, at Oniontree og dansibólkurin Biit hava framført í KLUBB 188.

- Men hesaferð er tað fyrstu ferð, at vit hava DJ og VJ SHOW í Klubb 188.



**Rósa brýtur álitið**

HANS PAULI STRØM
KJAK Á SÍÐU 14



**For-hobentliga stadivekk**

EYÐUN Á BORG
KJAK Á SÍÐU 26

# Bestu spælarar og Páll finn

Leygarkvøldið verður Hvonn Live aftur á skránni. Hetta er beinleiðis sending hjá Rás2, sum verður send av Hvonn í Havn. Hesaferð verða bestu fótbóltsspælararnir í farna kappingarári heiðraðir, og helst best umtókti føroysku tónleikabólkurin í løtuni fer at spæla live og práta við vertirnar í sendingini. Miðlahúsið fer saman við venjarum og liðformonnum á liðunum í bestu mans- og kvinnudeildunum at kjósa ársins spælarar, stjørnuskot, málmenn, venjarar og toppskjúttar. Eisini verður ein fair play virðisløn latin til tað liðið í Vodafone deildini, sum hevur skikkað sær best. Í sendingini verður prátað við vinnararnar, FSF-forsetin Christian Andreasen støkkur inn á gólvið til eitt prát, og Rás2-viðmerkjari fer at siga sína hugsan um, hví HB gjørdist føroyameistari framman fyri EB/Streym og NSÍ. Páll Finnur Páll má verða best umtókti tónleikabólkurin í Føroyum í løtuni – í øllum førum millum yngra ættarliðið. Teir vitja í Hvonn Live hesaferð. Teir sleppa at svara naskum spurningum, og teir fara eisini at spæla live á Hvonn. Hvonn Live er á skránni leygarkvøldið kl. 20.00, og fólk eru væl komin á Hvonn at fylgja sendingini. Eisini ber til at hoyra alt á Rás2.



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00
**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo